UTTAN ÚR HEIMI

# Politiskur jarðskjálvti í Ísrael

**Ariel Sharon, forsætisráðharri, vil hava nýval, og samstundis hevur hann gjørt av at spreingja Likudflokkin**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein politiskur jarðskjálvti er á veg í Ísrael, og hann fer at broyta tað politiska landslagið í landinum nógv.

Soleiðis lýsir ein vælvitandi kelda í stjórnarumsitingini tað, sum fer at henda, nú Ariel Sharon, forsætisráðharri, hevur gjørt av at skriva út nýval og at stovna sín egna flokk. Tað kann gerast mønustingurin hjá Likud.

Í gjár ljóðaði, at umleið ein triðingur av tingmanningini hjá Likud ætla at taka sama stig sum Sharon og at fara upp í tann nýggja flokkin, sum verður ein miðflokkur í ísraelskum politikki. Samstundis vísti ein nýggj meiningakanning, at tann nýggi flokkurin hjá Sharon kann fáa 28 umboð í tinginum, meðan Likud fær bara 18.

Tað kom ikki óvart á teir politisku eygleiðararnar, at Sharon tók avgerð um at stovna egnan flokk, tí ósemjan um afturtøkuna úr Gaxa hevur í veruleikanum býtt stjórnarflokkin í tveir partar. Teir flestu tinglimirnir hjá Likud vóru ímóti afturtøkuni, men Sharon valdi at seta hart ímóti hørðum, og tí slapst ikki undan, at flokkurin skrædnaði, skrivar Reuter.

Í veruleikanum hevur Sharon bara bíðað eftir einum høvi til at taka tað endaliga stigið. Tað kom hósdagin, tá Arbeiðaraflokkurin samtykti at fara burtur úr samgongustjórnini. Sama dag samdust Sharon og formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Amir Peretz, um nýval, og so kiundi Sharon boða frá, at hann stovnar sín egna flokk.

Eygleiðarar í Miðeystri siga, at tað verður uttan iva eitt framstig fyri friðartilgongdina, at Sharon fær sín egna flokk, og at hann kann skúgva teir víðgongdu heykarnar í Likud til viks.



*Ariel Sharon elvir til politiskan jarðskjálvta í Ísrael*

Mynd: Reuters

# Rækjurnar vóru svartkalvi

**Seinastu dagarnar hevur norska sjóverjan tikið tveir spanskar trolarar fyri ólógliga veiði við Svalbard**

FISKIVEIÐA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Seinasta fríggjadag avdúkaðu menn hjá norska fiskiveiðieftirlitinum, at ein spanskur trolari hevði nógvan svartklava í lastini, sjálvt um hann segði seg fiska rækjur. Í gjár kom trolarin til Tromsø saman við einum sjóverjuskipi, og mett varð, at trolarin hevði umleið 80 tons av svartkalva í frystilastini.

Men hetta var ikki tann einasti spanski trolarin, sum hevði fiskað annað enn tað, sum hann segði seg fiska. Sunnudagin fóru norskir eftirlitsmenn umborð á trolaran "Garoya Segundo". Alment var hann komin á Svalbardleiðina at fiska rækjur, men tað vísti seg, at hann hevði meiri enn 100 tons av svartkalva í lastini, men í dagbókini hjá skipinum stóð ikki eitt orð um, at teir høvdu fingið nakran svartkalva.

John Espen Lien hjá norska fiskiveiðieftirlitinum sigur við Aftenposten, at lastin hjá "Garoya Segundo" er millum tvær og tríggjar milliónir krónur verd, men hann dugir ikki at siga, at samband er ímillum teir báðar sponsku trolararnar, sum eru tiknir.

-Tað er ikki loyvt at fiska svartkalva við Svalbard, og tilburðirnir við teimum báðum sponsku trolarunum vísa, hvussu umráðandi tað er at hava neyvt eftirlit við fiskiskapinum her, sigur John Espen Lien.

## Hann ræðist stjørnurnar

Forsætisráðharrin í Teilandi, Thaksin Shinawatra, hevur boðað frá, at hann fer ikki at tosa við fjølmiðlarnar teir næstu mánaðarnar. Orsøkin er, at gongustjørnan Merkur standur beint fyri hansara egna stjørnutekni, og tað boðar sambært ráðgevum forsætisráðharrans ikki frá góðum. Tí fer hann ikki at tosa við fjølmiðlarnar, fyrr enn Merkur fer frá hansara stjørnutekni, skrivar AP úr Bangkok.

Thaksin Shinawatra hevur júst verið og vitjað í Kina og Suðurkorea, og tað var aftan á heimferðina, at hann boðaði teilendska almenninginum frá avgerð síni.

Teilendski forsætisráðharrin og landsins fjølmiðlar hava ikki sitið serliga væl um sátt tey fýra árini, hann hevur verið stjórnarleiðari. Tey, sum finnast at honum, siga, at hann roynir at avmarka pressufrælsið, og at hann meiri enn eina ferð hevur skipað so fyri, at hansara politisku partamenn hava fingið avgerandi ávirkan á, hvat fjølmiðlarnir kunnu loyva sær at siga ella skriva.

## Skyldfólkini svíkja al-Zarqawi

Tann blóðuga bumbuatsóknin at trimum gistingarhúsum í jordanska høvuðsstaðnum Amman tann 9. november hevur nú fingið skyldfólkini hjá yvirgangsmanninum Abu Musab al-Zarqawi at venda honum bakið.

Um vikuskiftið høvdu 57 av skyldfólkum hansara sett eina stóra lýsing í tey størstu jordansku bløðini, har tey kunngjørdu, at tey hava gjørt av at kvetta alt sambandið við al-Zarqawi líka til dómadag, sum tikið varð til. Ímillum teirra, sum stóðu undir lýsingini, vóru ein bróður al-Zarqawi og fleiri av systkinabørnum hansara.

Beint áðrenn lýsingin kom í bløðini, hevði al-Zarqawi boðað frá, at hann ætlar sær at beina fyri jordanska konginum Abdullah Øðrum. Eygleiðarar í Amman siga, at lýsingin hjá skyldfólkunum er uttan iva eitt álvarsamt bakkast fyri yvirgangsleiðaran, tí nú kann hann ikki kenna seg vísan í at fáa vernd ella hjálp frá skyldfólkunum.

## Píndu fangar til deyða

Myndugleikarnir í Irtak hava illgruna um, at løgreglan í býnum Basra hevur pínt tveir menn so illa, at teir at enda doyðu í einum kliva á løgreglustøðini í al-Jamiyat. Málið kemur bretum illa við, tí teir iraksku løgreglumenninir høvdu verið í læru hjá bretsku herdeildini, sum hevur støð í Basra.

Vælvitandi bretskar keldur siga, at løgreglumenninir píndu teir báðar menninar við einari elektriskari borimaskinu, og at menninir høvdu fleiri hol á beinunum, ørmunum og høvdinum, skrivar AP.

Bretski verjumálaráðharrin, John Reid, sigur við blaðið The Independent, at hann er kunnaður um tilburðin, og at hann eisini hevur fingið at vita, at fangar eru eisini píndir í øðrum førum. Bretska hernaðarløgreglan í Basra hevur greitt ST frá málinum, og tað verður nú kannað nærri, skrivar The Independent.

## Í fongsul fyri kravgongu

68 fólk, sum fingu kravgongu við kravi um størri rættindi til tey samkyndu í Pólandi, kunnu vænta at sleppa í fongsul afturfyri.

Kravgongan var í býnum Poznan. Býráðið hevði sett forboð fyri kravgonguni, men nøkur hundrað fólk valdu at seta seg upp ímóti forboðnum. Aftaná fingu 68 teirra at vita, at tey fáa seinni at vita, um tey fáa bót, ella um tey skulu í fongsul fyri at hava gjørt ímóti forboðnum. Sambært reglunum kunnu tey fáa ein mánaða fongsul.

Póland verður roknað sum eitt av teimum konservativu katólsku londunum í Evropa. Tey seinastu árini hava myndugleikarnir fingið altsamt størri trupulleikar av einum veksandi kravi um rættindi hjá samkyndum, og fleiri ferðir hava samanbrestir verið ímillum mótmælisfólk og løgregluna.